# Starvslýsing

**Søkt verður eftir pedagogum til Vøggustovuna og pedagogum/hjálparfólkum til Barnagarðin við Velbastaðvegin.**

**Søkt verður eftir 2 pedagogum og 1 hjálparfólki til Barnagarðin.**
Arbeiðstíðin er 30 - 40 tímar um vikuna eftir nærri avtalu. Um ongin pedagogur søkir starvið, verða hjálparfólk sett í størvini.

**Søkt verður eftir 2 pedagogum til Vøggustovuna.**
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna við møguleika at arbeiða fulla tíð. Um ongin pedagogur søkir starvið, verða hjálparfólk sett í størvini.

Øll størvini verða sett 1. august 2003, ella eftir nærri avtalu.

Eisini søkja vit eftir 2 pedagogum til Vøggustovuna at starvast fyri fólk í barnsburðarfarloyvi, at byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Vøggustovan og Barnagarðurin eru sjálvsognarstovnar, sum verða samanlagdir til ein stovn 01.januar 2004, samstundis sum stovnurin gerst kommunalur.
Í hesum sambandi verða bygnaðarbroytingar framdar so tað tá verður *ein* leiðari fyri stovnin og tveir varaleiðarar.
Stovnurin verður umvaldur og bygt verður aftrat verandi bygningi, so bygningurin gerst meiri tíðarhóskandi. Vit hava felags garð og er hann sera góður við náttúrðulendi og tilrættarløgdum øki til okkara børn við nógvum ymsum avbjóðingum.

Tilgongdin við at samanleggja stovnarnar er byrjað og tí vera allir starvsfólkafundir, ráðleggingardagar og skeið hildin felags fyri báðar stovnarnar.

Vit ynskja at finna fólk, ið bæði duga at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva. Fólk ið vilja vera við í okkara broytingartilgongd - eisini við nýggjum hugskotum. Fólk ið dáma at brúka náttúrðuna í tí pedagogiska arbeiðinum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi innan 23. juni 2003 kl.12.00.
Viðmerkið í umsóknini, hvat starv tit søkja. Setanarsamrøður verða 25. og 26. juni 2003.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Monu R. Mohr; leiðara í Barnagarðinum tlf. 314373 og/ella Sólrun Jacobæus; settur leiðari í Vøggustovuni tlf. 314379

**Vøggustovan og Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
**Velbastaðvegur 39**
**FO-100 Tórshavn**

---

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur

Á **B5** er eitt fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur í kvøldvakt á starvsbrøki 0,7 leyst at søkja til setan 1. juli 2003 ella eftir avtalu.

Deildin er ein kirurgisk deild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 25 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á B5 á telefon 31 35 40, lokal 105 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 499 L, e-postur ceci@lsh.fo

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:**
- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- sum hevur fakliga vitan og royndir innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- við fleksibiliteti og góðum samstarvsevnum
- sum er opin og positiv
- sum vil søkja mennandi avbjóðingar

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 27. juni 2003 kl. 12.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

---

# Ein serlig heilsan til Føroya Keypssamtøku

Arbeiðarafeløgini takka Keypssamtøkunum fyri stuðul teirra undir verkfallinum, við ikki at bróta verkfallið.

Og fara vit at heita á limir okkara, um at hava í huga í framtíðini, at Keypssamtøkurnar virdu verkfallsrætt okkara.

Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Sosialurin 341800

---

# Dagrøktari

## Eitt gevandi starv

Dagrøktari søkist til dagrøktina í Nes kommunu til at byrja 15. august 2003.

Sum dagrøktari gerst tú partur av einum felagsskapi, við børnum og dagrøktarum, sum javnan hittast í spælistovuni. Eisini verður skipað fyri starvsfólkafundi einaferð um mánaðin og skeiðvirksemi minst einaferð um árið.

**Vit krevja:**
- At tú ert før/førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur hug at ansa børnum í heimi tínum
- At tú ert frísk/frískur og engagerað/engageraður

Løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Umsóknir skulu vera Dagrøktini í Nes kommunu í hendi seinast 01.07.2003. Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 448462.

**Nes Kommuna**

---

# La Carreta til sølu



Um hóskandi boð fæst er matstovan og gistingarhúsið La Carreta í Vestmanna til sølu.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
Telefontíð: 9³⁰-12⁰⁰ og 13⁰⁰-16⁰⁰

| | |
|---|---|
| Tórmó›ur Djurhuus, adv. | Ingi Højgaard, adv. |
| Jógvan Páll Lassen, adv. | Petur Even Djurhuus, adv. |
| Jógvan E. Ellefsen, adv. | Anna Dam, adv. |

---

# Hús í Vági til sølu

Hús á Oyralagi í Vági til sølu um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu ringja

**Tlf. 37 38 74**

---

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Gøtu kommuna søkir

**1 dagrøktara** at byrja 4. august 2003.

Dagrøktarheimið skal vera innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spælioki uttanfyri.
Í skipanini eru tríggjar dagrøktarar, tvær í Syðrugøtu og ein í Norðragøtu. Vit hava skipa eina spælistovu, har dagrøktarar saman við børnunum og leiðaranum koma saman til ymiskt, ein dag um vikuna mánadag frá kl. 7.30 til kl. 12.00. Vit eru í stovuni sum frítíðarskúlin brúkar.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

### Til Dagstovnin í Gøtu søkist

**1 pedagog** til starv í frítíðarskúlanum, »Skorðan« at byrja 18. aug. 03. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

**1 pedagog** til starv í barnagarðsstovu, »Látri« at byrja 4. aug. 03. Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna.

**1 hjálparfólk** til starv í barnagarðstovu, »Látri« at byrja 4. aug. 03. Arbesiðtíðina er 30 t. um vikuna.

**1 pedagog** til starv í barnagarðstovu, »Á Helluni« at byrja 4. aug. 03. Arbeiðstíðin er 30 t. um vikuna, møguleiki er at fáa 35 t. um vikuna.

Í dagstovninum eru 5 stovur, ein vøggustova »Á Rókini« 14 pláss 0-2 ár,
ein smábarnastova »Í Gjónni« 18 pláss 2-4 ár,
ein barnagarðsstova »Á Helluni« 21 pláss 4-6 ár,
ein barnagarðsstova við børnum í forskúlaaldri »Látri« 20 pláss
og frítíðarskúlin til børn í 1. flokki »Skorðan« 10 pláss.
Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000 og liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk fyribils sett.
Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10. Skrivlig umsókn skal sendast okkum áðrenn hósdagin 19. juni 2003. Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
boks 32
511 Gøtugjógv

**Gøtu Kommuna**

---

# Kom og gakk

Tórshavnar kommuna fer til gongu.

Setið bilin og gangi við okkum av Vaglinum
14. juni kl. 15.00.

Komið allir borgarar høgir sum lágir, stórir sum smáir, rundir sum mjáir.

---

**Fíggjarmálaráðið**

# Varastjóri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar, eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 30 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðunum:
www.fmr.fo
www.tollskatt.fo

E-mail:
fmr@fmr.fo

Kundi tú hugsað tær at verið varastjóri í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya?

Tú kemur í tøttum samstarvi við stjóran at taka tær av leiðsluni á Toll- og Skattstovu Føroya, ið m.a. fevnir um hesar uppgávur:

- Seta mál og langtíðarplanlegging
- Fíggjarstýring
- KT-politikkur og KT-viðurskifti
- Trygdarpolitikkur og trygdarviðurskifti
- Innanhýsissamskifti øki og deildir
- Samskifti við borgarar og virki
- Uttanlandssamskifti
- Veita landsstýrismanninum í Fíggjarmálum tænastu
- Skatta- og avgjaldsfyrisitingarpolitikkur
- Eftirlitspolitikkur
- Innheintingarpolitikkur

Hevur tú visiónir, góð samstarvsevni, og ert tú ágrýtin, virkin og úrslitagóður, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn. Leiðsluútbúgving og leiðsluroyndir kunnu vera ein fyrimunur.

**Krøv**
Útbúgving frá hægri lærustovni krevst, t.d. innan fak sum fíggjarstýring, kunningartøkni, fyriskipan o.a.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag og verður sett 1. september 2003. Starvið verður flokkað ájavnt við 36. lønarflokk í tænastumannafelagssáttmálanum.

**Umsóknarfreist**
Kundi tú hugsða tær at royndt hesa avbjóðing, so send okkum eina umsókn, CV og viðmæli, innan mánadagin 30. juni 2003.

**Fíggjarmálaráðið**
Postboks 2039
165 Argir

Vilt tú frætta meir, ert tú vælkomin at ringja til Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóra, á tlf. 352020.

---

# Tøkk

Til øll, ið vóru við í verkfallinum á ein og annan hátt.
Tit, ið stuðlaðu bæði inni og úti, burturi og heima.

Verkfallvaktir og leiðarar, kokkar, bussførarar og annars øll, ið góvu eina hjálpandi hond undir verkfallinum, tey ið góvu skerpikjøt og annað gott.

Allir limir í feløgunum - takk fyri sera gott samanhald, uttan tykkara stuðul megnaðu vit ikki at vinna stríðið - samanhald gevur styrki.

Eisini ein tøkk til øll hini verkafeløgini, ið stuðlaðu undir verkfallinum, bæði við skrivum, lýsingum og peningaliga.

Eingin nevndur, men sanniliga eingin gloymdur.

Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Sosialurin 341800

---

# LUTASEÐIL

Fæst á Statoilstøðunum kring landið



1. Toyota Corolla 1.6 Terra Sedan virði 199.600 kr.
   (Frá Reyni Service)
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm t/r við uppihaldi í eina viku í Danland ella DanCenter (Frá Smyril Line) virði 19.995 kr.
3. Olja frá Statoil virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Thomas Dam á Hálsi virði 10.000 kr.
5. Apex ferðaseðil fyri 2 til DK t/r (Frá Smyril Line) virði 6.266 kr.
6. Gávukort frá LM handlinum virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Radiohandlinum v/ E. & P. Persson virði 5.000 kr.
9. Føroyskt krov virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 5. og 6. august 2003.
Eisini kann ringjast til Kristiannu tlf. 227 717 · 312 380 · 319 017

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð
2003 20 kr.